

# Føroyar mítt land

Hjá teimum, sum kanska hvørki eru morgun- ella kvøldfólk, er høvi at hoyra tær sendingarnar í røðini "Føroyar mítt land", sum hava verið sendar í vikuni. Tað verður í einari sending á Rás2 sunnudag klokkan 13. Tey fimm evnini, sum vórðu umrødd í sendirøðini hesa vikuna, vóru gerðin av Oyggjarvegnum fyrst í sekstiárunum; stórbóndin Mikkjal í Lamba, sum livdi í seytjandu øld; føroyski tjóðbúnin, hesa ferð knappatroyggjan; gomul húsanøvn í Havn og veður. Tey, sum skrivaðu og bóru fram sendingarnar hesa vikuna, vóru Magnus Gunnarsson, Maria Jacobsen, Nicolina Jensen Beder Eirikur Lindenskov og Janus Mohr

Rás2, sunnudagin klokkan 13.

**Føroyar mítt land í næstu viku:**

26/5 Ólavur Clementsen
27/5 Jenny Lydersen
28/5 Nicolina Jensen Beder
29/5 Magnus Gunnarsson
30/5 Petur Martin Petersen

Hvønn gerandisdag kl.8, kl.9, kl.22 og kl.23, (týsdag tó 2230)

# Kirkja klár til kongaliga vígslu

Leygardagin giftast Joachim prinsur og Marie Cavallier í kirkjuni í Møgeltønder, og har hava tey seinastu dagarnar havt úr at gera við at fríðka um kirkjuna og økið rundan um.

Forvitin ferðafólk hava eisini lagt leiðina framvið í Møgeltønder fyri at vita, hvussu tað sær út har, nú kongalig innrás verður í morgin.

Møgeltønder verður av álvara í miðdeplinum leygardagin, tí bæði DR og TV2 hava gjørt sær sjónvarpsstudio í býnum, og haðani fara tey at senda allan leygardagin. Eisini verður roknað við, at fleiri hundrað tíðindafólk koma til Møgeltønder at fylgja kongaligu vígsluni leygardagin.



Sosialurin